

# Samkomublaðið fyri mai

# 2016

KELDAN

Okkara visión er, at Keldan skal vera ein andaligur miðdepil fyri allar Føroyar








www.keldan.fo

Samkomuleiðarapar: Pauli & Jastrid Høj. Tlf. 232511 & 232510



# Hví hoyra vit ikki sannleikan?

**Pauli Høj**

Jóhs. 8,32: ”Og tit skulu skilja (kenna) sannleikan, og sannleikin skal gera tykkum fríar.”

Hetta versið sigur, at sannleikin setur teg ikki frían av sær sjálvum. Nei, tá tú kemur at kenna sannleikan, verður tú fríur. Guds opinbering má koma við Orðinum, sum tú tekur ímóti.

Jesus tosaði til tíðir við eina fjøld av menniskjum, sum komu fyri at hoyra Hann, men tað vóru ikki øll, sum tóku ímóti, tí tey skiltu tað ikki. Lærusveinarnir spurdu Jesus, hví hann tosaði í líknilsum, har hann sigur, at tað var fyri at fáa tey at fata.
Ein lærisveinur Jesusar er ein, sum hevur skilt sannleikan og tikið ímóti.

Matt. 13,11 Hann svaraði: ”Tí - tykkum er givið at kenna loyndarmál Himmiríkis ríkis;
men teimum er tað ikki givið.”

Orsøkin til, at menniskju ikki skilja, er, at teirra hjarta er vorðið hart. Hjartað hjá menniskjanum gert stigvíst hart. T.v.s. at tú hoyrir nakrar sannleikar, sum tala til tín, men tú gert einki við teir ella hugsar, at eg bíði, ikki nú, men kanska seinni. So við og við veitst tú ikki av, at tað legst eitt ósjónligt skýli yvir tíni eygu og oyru, sum til endans ger, at tað ikki rakar teg meira.

Matt. 13,15:”Tí hjartað í hesum fólki er vorðið hart; við oyrunum hoyra tey tungliga, og eygu síni hava tey latið aftur - fyri at tey skulu ikki síggja við eygunum og hoyra við oyrunum og skilja við hjartanum - og venda við, so Eg kundi grøtt tey."

Trúgvin byrjar, har Guds vilji blívur kendur. Tá ið vit vita, hvat Hann vil, og hvat Hansara Orð sigur um eina torføra støðu, tað kann vera sjúka, royndir, stormar í okkara lívi, so kunna vit standa á Guds lyftum fyri tí støðu, sum er torfør. Manglandi opinbering ger, at vit ivast ella eru vantrúgvnadi.

Okkura hjarta verða ofta samanborin við jørð ella mold. Um tú skalt seta eina plantu niður, er neyðugt við góðari mold, um tað, sum er sett niður, skal vaksa upp. Soleiðis er við Guds Orði. Tað er sáðið, sum vit kunnu taka ímóti í hjørtum okkara. Eitt bleytt hjarta er gróðrarbotnurin fyri Orðinum.
Tann sama sólin, sum fær plantuna at spíra, kann eisini køva somu plantu, tí røturnar ikki fara niður at festa seg. Hetta er eisini ein góð mynd av, hvat hendir, tá vit ikki hoyra og skilja sannleikan.

Matt. 13,23:”Men tað, sum sáað varð í góða jørð, er tann, ið hoyrir orðið og fatar tað, og sum so ber ávøkst; ein gevur hundraðfaldan, ein sekstifaldan og ein tríatifaldan.”

# Skrá fyri mai

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 2. mai | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 3. mai | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 4. mai | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| Leygardagur | 7. mai | kl. 20.00: | AWAKE við Annalisa Hilary Jacobsen |
| Sunnudagur | 8. mai | kl. 11.00: | Morgunmøti við Ólavi Jacobsen<br>Innsavnan av tíggjund og heiløgum gávum |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 9. mai | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 10. mai | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 11. mai | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| | | kl. 18.00: | Leiðarakveiking við Sam Jakobsen |

13.-15. er samkomulega í Kelduni

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1.hvítusnnudagur | 15. mai | kl. 11.00: | Morgunmøti við ymiskari luttøku frá samkomuleguni |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 16. mai | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 17. mai | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 18. mai | kl. 20.00: | Konsert við Planetshakers. Sí meira á keldan.fo |
| Hósdagur | 19. mai | kl. 10.30-13: | Mammukafé |
| Leygardagur | 21. mai | kl. 20.00: | AWAKE XL við Ingibjørn Royðutoft |
| Sunnudagur | 22. mai | kl. 11.00: | Morgunmøti við Sámal Hanne og Ásbjørn úr Betania, Skopun |
| | | kl. 20.00: | Á sanganna veingjum |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 23. mai | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 24. mai | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 25. mai | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| Leygardagur | 28. mai | kl. 20.00: | AWAKE |
| Sunnudagur | 29. mai | kl. 11.00: | Morgunmøti við Maibritt Frederiksberg |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 30. mai | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 31. mai | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 1. juni | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| Hósdagur | 2. juni | kl. 10.30-13: | Mammukafé |
| Leygardagur | 4. juni | kl. 20.00: | AWAKE við Ólavi Jacobsen. Evni: Dópur |
| Sunnudagur | 5. juni | kl. 11.00: | Sjónvarpsmøti við Paula Høj o.fl.<br>Innsavnan av tíggjund og heiløgum gávum |

# Lýsingar

**Samkomulegan 2016**
Nú verður aftur skipað fyri samkomulegu í Kelduni. Legan er løgd á hvítusunnu, vikuskiftið 13.- 15. mai.
Legan er fyri okkum øll, og vóna vit, at undirtøkan verður eins góð og undanfarna ár.
Hugsjónin við legnuni er veking, vøkstur og vinalag. At vaksa nærri Gudi og nærri at hvør øðrum, alt meðan vekingarandin fær loyvi at birtast.
Tilmeldingarfreistin er 1. mai.
Les meira á keldan.fo um tilmelding, prísir o.a.

**Filmskvøld**
Mikukvøldið 4. mai kl. 21, verður filmurin "War Room" vístur í Kelduni.
Um filmin:
Parið Jordans, sær út til at hava alt - gott starv, vakra dóttir, eitt dreymahús. Men ikki er alt gull, ið glitrar! Tað vísir seg, at maðurin Tony (T. C. Stallings) spælir við freistingarnar, og konan Elizabeth (Priscilla Shirer) gerst alsamt meiri beisk, niðurtyngd av strongd í einum hjúnabandi í upploysn.
Men óvæntað kemur vend í lív teirra, tá Elizabeth møtir sínum nýggjasta viðskiftafólki, ið uppmuntrar parinum at finna eydnu gjøgnum bøn.
Les meira um filmin og síggj lýsing av filminum á www.warroomthemovie.com

**Planetshakers í Kelduni**
Heimskendi tónleikabólkurin Planetshakers kemur til Føroya!
Konsertin verður í Kelduni í Skálafirði mikukvøldið 18. mai, og er tað Keldan, ið samskipar vitjanina.
Sí meira á www.keldan.fo/ps

**Á sanganna veingjum**
Sunnukvøldið 22 mai kl. 20.00 verður væl dámda og væl vitjaða Á SANGANNA VEINGJUM aftur í Kelduni, Skálafirði.
Vit fara at syngja góðar kendar sangir saman. Eisini verður onkur framførsla, og vit fara at hoyra ein evangeliskan boðskap.
Aftaná hugna vit okkum sjálvandi við einum góðum drekkamunni :-)
Kom og syng saman við okkum og bjóða eisini øðrum við.

## Gáva til samkomuna og samkomuvirksemið

Tíggjund/gáva til Kelduna kann flytast á kontu: 9181-1205066 og 6460-1568592
Gáva til missión kann flytast á kontu: 9181-1231369 og 6460-1568606
Gáva til útbygging kann flytast á kontu: 9181-7074346 og 6460-1568584